**Kæra 1/2018**

# Yvirkærunevndin hjá F.S.F. hevur tikið avgerð:

**Yvirkærunevndin tekur undir við og staðfestir avgerðina hjá Aganevndini tann 8. juni 2018 í málinum millum HB og NSÍ.**

Yvirkærunevndin hevur móttikið kæru frá NSÍ tann 13. juni 2018 um omanfyri nevndu avgerð, har ið mett verður at lógargrundarlagi ikki er so greitt, og revsingin ov hørð.

Faktuelt er staðfest í málinum, at ungi NSÍ leikarin hevur sambært dómaraseðlum leikt 3 dystir sama leikdag og sambært § 8, stk. 3, so er tað greitt brot á reglarnar, við tað at loyvt er bert at spæla 2 dystir sama leikdag. Víst verður § 8, stk. 4., hvussu leikdagur verður roknaður.

Tá ið ongar serligar reglur eru um U21, so er tað eisini greitt sambært lógargrundarlagnum hjá F.S.F., at so er tað kappingarreglurnar hjá F.S.F.´s sum er galdandi, og tískil tekur Yvirkærunevndin undir við og staðfestir avgerðina hjá Aganevndini.

Í sambandi við revsingina, so eru tað fordømi um, at brúk av ólógligum leikara elvir til, at felag verður dømt at tapa dystin, sambært grein 8, stk. 1, bókstav h í Agareglugerðini.

Yvirkærunevndin ger ikki meir við hetta mál, og vil bert vísa til avgerðina og viðgerina av málinum hjá Aganevndini, tann 8. juni 2018, sum Yvirkærunevndin tekur undir við og staðfestir.

## Yvirkærunevndin hjá F.S.F.

**Tórshavn, tann 21. juni 2018.**

Andrass Holm Arge, formaður.

Høgni H. Høgnesen, næstformaður.

Jens Erik Magnussen, nevndarlimur.